## Bara timbur umborð

Russisku myndugleikarnir kunngjørdu í gjár, at teir hava ikki funnið annan farm enn timbur umborð á farmaskipinum Arctic Sea, sum hvarv, eftir at tað var farið úr Finnlandi tann 23. juli. Tríggjar vikur seinni kom eitt russiskt herskip fram á Arctic Sea nærhendis Kap Verde-oyggjunum úti fyri vesturafrikonsku strondini. Fleiri hava gitt, at ísraelska fregnartænastan steðgaði skipinum, tí tað var á veg til Iran við rakettum, men tað avsanna russar. Eitt nú skrivaði bretska blaðið The Sunday Times, at russiskar loftverjurakettir vórðu koyrdar umborð á skipið í Kaliningrad, eftir at tað hevði fermt timbur í Finnlandi.



## Bhumibol innlagdur

Kongshúsið í Teilandi kunngjørdi í morgun, at kongurin, Bhumibol Adulyadej, er fluttur á sjúkrahús í Bangkok. Einki varð sagt um, hvat bagir kongi, men at hann fær antibiotika og vætu. Bhumibol hevur verið kongur í Teilandi, síðani hann bleiv krýndur í mai í 1950, men hansara politiska vald er rættiliga avmarkað. Í hansara kongstíð hava 17 hernaðarkvett verið í Teilandi, og landið hevur havt 26 forsætisráðharrar, meðan hann hevur verið kongur. Bhumibol, sum er 81 ára gamal, er nógv avhildin í heimlandinum.

# lv apuna

hjá landsstýriskvinnuni. Tá hon sigur at Almannamálaráðið á hvørjum ári fær nýggjar umsóknir ella umsóknir at endurnýggja, er tað í roynd og veru Almannamáláráðið, ið tekur avgerðina. Og tað er í roynd og veru eisini tað, ið er farið fram í málinum um Levi.

### Almannastovan tekur ikki avgerðina

Í lesarabrævi fríggjadagin kemur stjórin á Almannastovuni, Petra Johnsdóttir Joensen við nøkrum rættingum.

»Eitt afturvendandi uppáhald í skrivingini hevur verið, at Almannastovan hevur avgjørt at taka fleiri ung heim í úrtíð, mitt í einum skúlaári. Hetta má Almannastovan afturvísa. Vit hava mælt landsstýriskvinnuni til at framleingja øll uppihald hjá ungum á donskum stovni við tilknýttari skúlagongd.

Í tí eina førinum ynskti landsstýriskvinnan tó, at kannast skuldi enn einaferð, um hóskandi tilboð var til drongin í Føroyum, áðrenn hon tók støðu. Tí bleiv uppihaldið í fyrstu atløgu bara longt til 1. oktober, meðan Almannastovan kannaði hjá skúlaverkinum, um serligt skúlatilboð til ung við ADHD og bútilboð á næmingaheimi kundi útvegast. Svar kom frá skúlaverkinum fyri nøkrum døgum síðan. Niðurstøðan varð, at drongurin vegna aldur ikki passaði so væl inn í tann bólkin, sum skuldi byrja í nýggja ADHD-serflokkinum. Upplýst varð eisini, at Næmingaheimið bara er ætlað ungum, sum ganga á Skúlanum á Trøðni. Landsstýriskvinnan boðaði sama dag Almannastovuni frá, at tilmælið hjá Almannastovuni frá juni mánaða um, at játta uppihald í Danmark eitt skúlaár aftrat, var gingið á møti.«

Sostatt er tað í hvørjum føri, tá børn og ung skulu sendast av landinum ella takast heimaftur, avvarðandi landsstýrisfólk, sum tekur endaligu avgerðina, um uppihaldið kann leingjast, ella tað ikki kann leingjast, og Almannastovan sostatt má boða foreldrunum frá, at tað ikki verður longt.

Í hesum førinum hevur Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, biðið Almannastovuna kanna, um nøktandi tilboð var til Levi Johannesen, áðrenn uppihaldið varð longt, og sostatt var hon sjálv orsøk til ruðuleikan, ið stóðst av hesum.

### Hans Pauli undrast

Seinasta mikudag setti fyrrverandi landsstýrismaðurin í Heilsumálum, Hans Pauli Strøm, ið eisini hevur varða av almannamálum í fleiri ár, Rósu Samuelsen ein fyrispurning um júst hetta.

Hann spurdi Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu í almannamálum, hvat hon heldur um, at Almannastovan og aðrir stovnar undir almannaverkinum, eru blivnir syndabukkar fyri tær óhepnu avleiðingar av einum politikki, sum hon hevur ábyrgdina av.

Hann sipaði til ákoyringarnar, sum nú hava verið á almannaverkið í eina tíð og hann helt, at Rósa Samuelsen hevur havt lyndi til tváa sínar hendur og at kasta skyldina yvir á Almannastovuna og aðrar almennar stovnar.

Hetta loypti øði í alt Løgtingið, sum satt at siga húðfletti Hans Paula Strøm.

Upprunin til henda spurning var eftir øllum at døma millum annað hetta dømið, har avgerðin liggur hjá landsstýriskvinnuni, men har landsstýriskvinnan í miðlunum tváar hendurnar og flytir ábyrgdina yvir á fyrisitingarliga partin, sum í hesum førinum var Almannastovan.

- Avgerðir av hesum kalibri skulu umvegis borið hjá landsstýriskvinnuni. Eitt tilmæli kemur frá Almannastovuni, og so ger landsstýriskvinnan av, um tilmælið skal fylgjast ella ikki, sigur Hans Pauli Strøm.

# eru keðiligir



*Jóannes Eidesgaard og Jørgen Niclasen halda, at tað er ikki verri ruðuleiki í politiska landslagnum nú, enn tað fyrr hevur verið, meðan Høgni Hoydal ikki heldur seg hava upplivað slíkan ruðuleika í sínum politiska lívi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

miðlarnar, og fjølmiðlarnir dyrka ósemjur, og serliga tá tær eru millum persónar í sama flokki.

Serliga vísti hann til forsíðugreinina á Sosialinum fríggjadagin, har Magni Laksáfoss segði ,at hann var útifrystur úr sambandsflokkinum.

- Tað vísir seg sum at skal man síggjast, so má man ganga úr takt, og tað dyrka fjølmiðlarnir. Men orðaskiftið í miðlunum er nógv harðari enn innanveggja, segði Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum.



*- Eg angri einki uttan tað, ið eg ikki havi gjørt. Men eg havi eina myrka fortíð, og mann má kunna fortelja um sína fortíð, sigur Jógvan á Høvdanum, yngri. Hann er kendur sum provokatør og stigtakari til mannfólkablaðið Ð*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Jógvan á Høvdanum angrar einki

**Hann var alkoholikari, totalt langt úti og hevði ongar grensur. Tó angrar hann einki uttan tað, ið hann ikki hevur gjørt. Jógvan á Høvdanum, yngri, greiddi frá lívi sínum í Hvonn Live leygarkvøldið**

SAMRØÐA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

– Eg havi eina myrka fortíð, segði Jógvan á Høvdanum, yngri.

Men hvat meinar hann við tí?

- Jú, eg var nekari fyrr, svarar hittinorðaði norðoyingurin aftur.

Hann er provokatør og roynir at ruska hetta rustaða samfelagið upp og provokera við eitt nú mannfólkablaðnum Ð. Men Jógvan á Høvdanum hevur eisini veruliga eina myrka fortíð, sum hann tó ikki er bangin fyri at fortelja um.

- Man má kunna fortelja um sína fortíð, sigur Jógvan á Høvdanum.

Sum ungur legðist hann í brennivínið, og longu sum 16 ára gamal tók drekkaríið yvirhond hjá honum. – Lívið var totalt langt úti og hevði ongar grensur. Alt tað sosiala fór í sor, og eg mátti velja millum at fara til avvenjingar ella drekka meg í hel. Tá drakk eg tríggjar fløskur av vodka um dagin, greiðir hann frá.

Í dag er hann turrlagdur og hevur fingið lívið aftur á rættkjøl. Hann greiddi frá, at tann besta løtan í lívi hansara var, tá sonurin kom í verðina. Nú hevur Jógvan á Høgvandum eisini tikið táttin upp aftur við mannfólkablaðnum Ð, saman við Dann Vinther.

– Endamálið við Ð er at ruska hetta rustaða samfelagið upp, og bara tað, sigur ein avgjørdur Jógvan á Høvdanum, yngri.

### Eg fái aldrin noy!

Á forsíðuni hevur hann ofta lítið ílatnar føroyskar gentur. Mangur man hava undrast, hvar hann finnur hesar ungu, vøkru moyggjar.

Fyrr fann hann tær í barrum og á vertshúsum. Men nú tá hann í tí dagliga ikki ferðast so nógv í tí umhvørvinum, hevur hann tikið til nýggjari miðlar.

- Eg brúki Facebook. Og tað koyrir bara. Eg fái ongantíð noy frá konufólkunum. Bara meðan eg havi verið her, havi eg funnið tríggjar, sum eg skal yvir aftur at tosa við um fimm minuttir, segði tann evigi provokatørurin, Jógvan á Høvdanum, yngri, í Hvonn Live leygarkvøldið.